

# Nú eisini gassfund vestan fyri Hetland

OLJULEITING
*Jan Müller*

Stóra franska oljufelagið Total (TotalFinaElf) staðfestir nú, at eitt gamalt gassfund frá 1986, eftir øllum at døma er so mikið stórt, at tað møguliga kann loysa seg at fara undir fyrstu veruliga gassútbyggingina á Atlantsmótinum í heila takið. Talan er um Lagganfeltið nakað vestan fyri Hetland ella miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið. Í tíðindaskrivi frá felagnum verður upplýst, at ein avmarkingarbrunnur, sum er boraðir fyrr í ár og síðani testaður, nú vísir seg at vera væleydnaður. Tað er risastóri boripallurin Jack Bates, sum hevur staðið fyri brunninum og hevur m.a. verið høvið hjá ferðafólki og manning á Norrønu, sum hava siglt millum Hetland og Føroyar at síggja gassglæmuna frá boripallinum. Hini feløgini, sum eru við í hesum loyvinum eru ChevronTexaco, Dong og Eni. Tvs. feløg, sum eisini eru og helst fara at vera virkin á føroyska landgrunninum.

Tað áhugaverda við hesum tíðindum er, at somu feløg umframt føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni hava fingið tillutað fleiri teigar í 22. brestku runduni nærhendis Laggan gassfundið.

Michel Contie, stjóri í Total sigur í tíðindaskrivi, at tey hava havt trupulleikar við at bora henda nýggjasta avmarkingarbrunnin, men kortini hevur drúgva boringin nú í fleiri mánaðir, givið felagnum nógvar nýggjar upplýsingar um goymslunøgd og sjálvt reservoiri. Enn er eingin avgerð tikin um at fara undir at byggja út, men felagið sær ljóst uppá, at tað fer at eydnast at útbyggja feltið við framtíðar handilsligum og tøkniligum loysnum. Total-stjórin sigur eisini, at tey eru sera fegin um úrslitið av 22. útbjóðingini, har Total hevur fingið tillutað fleiri teigar í Laggan-umhvørvinum.

# Spennandi tíð á Atlantsmótinum




*Vit síggja føroysku útbjóðingina og síðani olju- og gassøki vestan fyri Hetland. Pílurin har norðuri við markið vísir, hvar oljufeløg helst hava gjørt tvey stór oljufund. Pílurin har suðuri við markið vísir, hvar Bedlingtonbrunnurin varð boraður. Hann er helst turrur. Pílurin miðskeiðis á kortinum vísir Laggan gassfeltið, sum vísir seg at vera størri enn higartil hildið. Møguleiki er her fyri tí fyrstu gassútbyggingini á Atlantsmótinum. Onnur smærri gassfelt sum Torridon, Laxford og Victory kunnu hugsast at blíva áhugaverd í framtíðini, um og tá infrastrukturur er komin uppá pláss. Longu syðri liggur so tað risastóra Clairfeltið, sum er tað størsta á øllum tí bretska landgrunninum. Tað varð funnið í 1977 og ikki fyrr enn nú ber tøkniliga til at fara undir framleiðslu. Kort: Føroya Jarðfrøðissavn*

OLJULEITING ANALYSA
*Jan Müller*

Tað hevur gingið báðar vegir við oljuleitingini á Atlantsmótinum líka síðani fyrsti borurin varð settur í fyri skjótt 30 árum síðani. Hóast verulig framleiðsla ikki fór í gongd fyrr enn fyrst í 90-unum, so vóru øll árini frá miðskeiðis í 70-unum og fram til 90-ini boraðir einir 170 brunnar. Nógvir av hesum vórðu turrir, men kortini vóru einstakir teirra bæði olju- og gassfund, sum tó hvørki konstnaðarliga ella tøkniliga hava verið metti lønandi.

Mest áhugaverda fundið varð gjørt í 77-78, tá BP rakti við oljuelefantin Clair nakað vestan fyri Hetland. Hesin goymir 5-6 milliardir tons av olju, men talan var um tunga olju og torførar jarðfrøðiliga umstøður, sum gjørdu, at tað ikki var hugsingur um at taka oljuna upp tá – fyri góðum 25 árum síðani.

Í 1986 var so enn eitt áhugavert fund gjørt vestan fyri Hetland, ikki so langt frá Clair. Tað var eitt gassfelt, sum fekk navnið Laggan. Mett var ikki, at hetta fundið varð nóg stórt til at fararast kundi undir nakra útbygging.

Við øðrum orðum sluppu oljufeltið Clair og gassfeltið Laggan at liggja órørd av mannahondum øll tey mongu komandi ár. Til tað so í dag – nú tøknin hevur ment seg munandi – ber til at tosa um at fáa bæði olju og gass upp úr undirgrundini.

Ikki fyrr enn í ár – 2004 – er útbygging av Clair veruleiki tvs. at hesin oljurisin hevur ligið í dvala, síðani hann var funnin fyri nærum 30 árum síðani. Fyrsta oljan frá Clair kemur upp úr undirgrundini seint í heyst. Og arbeitt verður við tveimum útbyggingum aftrat næstu árini.

Og beint í grannalagnum liggur so Laggan gassfeltið og bíðar. Total hevur júst boðað frá, at seinasti avmarkingarbrunnurin er sera positivur, og okkurt kundi tí bent á, at feltið verður útbygt komandi árini tvs. 20 ár eftir, at tað varð uppdagað. Og hetta merkir, at vit fara at síggja ein infrastruktur á økinum millum Hetland og føroyska markið, sum kann fáa stóran týdning fyri møguliga framtíðar framleiðslu á okkara landgrunni.

Nettupp Clair og Laggan eru boð um, at Atlantsmótið kortini hevur eina áhugaverda framtíð og kann gerast ein nýggjur Norðsjógvur, sum mong hava vónað og sæð fram til.

Men sum støðan er í dag, so verður olja bert framleidd á einum lítlum og avmarkaðum øki á Atlantsmótinum. Tað er har suðuri við markið, har oljufeltini Foinaven, Loyal og Schiehallion nú hava framleitt olju í eini 10 ár.

Aftrat hesum feltunum eru eisini fleiri áhugaverdir brunnar boraðir í grannalagnum og fund gjørd. Spurningurin er so bara, nær og um hesi eru nóg lønandi. Tað vilja komandi árini vísa, og kann væl vera, at vit her fara at uppliva tað sama, sum er hent og er við at henda við Clair og Laggan longur norðuri. Feltini vit tosa um eru Solan og Strathmore og Suilven. Eisini Conival kann verða eitt slíkt. Tað at ein infrastrukturur er við at byggjast upp í nánd av hesum fundum, ger tey – hóast minni í stødd – lønandi. Tað er so nettupp framtíðar vónin fyri Atlantsmótið, at infrastrukturur kann lata upp fyri fleiri smærri fundum og gera tey lønandi.

Vit mugu so heldur ikki gloyma, at nógv av loyvunum, sum bretska stjórnin lat oljufeløgunum í 22. rundu, eru at finna á Atlantsmótinum, har feløgini meta góðar møguleikar vera at finna bæði olju og gass

Men eisini aðrar avbjóðingar standa fyri framman – fram við markinum. Tíðindini seinastu dagarnar um stórt fund kann bara hava positiva ávirkan á alt økið. Hóast lítið og einki hoyrist um úrslitið av trimum brunnum skamt frá føroyska markinumm á bretska landgrunninum, so eiga vit tó at eygleiða teir við stórum áhuga, tí teir kunnu bókstaviliga sagt verða við til at byggja brýr millum bretska og føroyska landgrunninum og harvið koma at fáa týdning og hvør veit nýggjan íblástur til leiting eftir olju og gassi allan vegin framvið markinum og her eisini okkara megin.

Brunnarnir, sum her verður sipað til, eru Rosebank, eisini nevndur Lochnagar har norðuri við markið, síðani Cambo, eisini nevndur Lindisfarne, eitt sindur longur syðri við markið og loksins Bedlington heilt har suðuri við markið. Feløgini, sum eru við í hesum brunnum er eitt nú Amerda Hess, Dong, BG, Statoil og ChevronTexaco og eisini okkara egna Atlants Kolvetni, tvs. flest øll feløg, sum longu hava loyvi á føroyska landgrunninum. Hetta er ein áhugaverd staðfesting, tí er tað so, at onkur ella kanska allir tríggir brunnar eru fund, tá kann man rokna við, at feløgini fara at gera nógv fyri at fáa teigar í 2. útbjóðing, sum liggja beint hinumegin markið, har hesi fund møguliga eru og verða gjørd á bretska økinum.

Lat tað vera sagt alt fyri eitt, at tíðindini, sum eru komin fram í pressuni um fund við markið, mugu takast við fyrivarni til tey eru váttað. Men vanliga kemur slíkt ikki fram, uttan at nakað er í tí.

Vit fáa nú at vita, at Lochnagarbrunnurin helst er eitt stórt oljufund. Vit hava eisini frætt, at Cambobrunnurin helst eisini er eitt fund. Eftir stendur at kanna, um fundini eru so mikið stórt, at tey veruliga eru lønandi. Vit mugu ikki gloyma, at tey liggja í einum fjarskotnum øki uttan infrastruktur av nøkrum slag. So tey mugu vera rímuliga stór skal tað løna seg at fara undir útbyggingar í 10 milliarda klassanum. Men er tað so at bæði Cambo og Lochnagar eru so mikið stór, so er ein møguleiki at brúka sama infrastruktur, sama framleiðsluskip osfr. Hetta er tó ikki bara líkatil, tá tað eru ymisk feløg, sum standa fyri lisensunum.

Vil væl til, og úrslitini liva upp til vónirnar og jarðfrøðiligu metingarnar, so kunnu vit koma at síggja útbygging av tveimum nýggjum oljufeltum beint við føroyska markið. Og vil enn betri til, so kunnu slík oljufelt strekkja seg inn á føroyskt øki eisini, og tað entá inn á teigar, sum eru bodnir út í okkara 2. rundu. Hetta kann ljóða í so bjartskygt men velja vit nú ta leiðina og trúgva uppá, at hesir báðir váðiligu brunnar, hava givið bingo, so vil tað hava nógv størri ávirkan á Føroyaøkið enn tey flestu hava givið sær fær um.

Nettupp Rosebank og Cambo (sí kortið) liggja uppat markinum, har okkara egna oljufyrisiting hevur boðið teigar út. Ein kann tá siga, at eitt slag av forarbeiðið tá longu er gjørt, sum kann vera til stórt gagn, tá feløg fara at gera kanningar her og kanska eisini bora. Einasta veruliga ivamálið vil tá vera tjúkka basaltið, sum ger tað torført at vita júst, hvar borurin skal setast í, hóast man "sær" okkurt har niðri.

Tað er greitt, at hetta eru bjartskygdar metingar, men tær eru ikki órealistiskar, tá hugsað verður um, hvussu stórar vónirnar hava verið. Vit hava m.a. hoyrt leitistjóran í ChevornTexaco siga í Norðurlandahúsinum, at útlitini fyri fundi í Rosebank vóru so mikið góðar sum 1 til 3.

Triði brunnurin er so Bedlington, sum liggur væl longri syðri. Tað skilst, at hann er møguliga turrur. Føroyaska oljufelagið Atlants Kolvetni er við har.

Hóast fýra brunnar eru boraðir hjá okkum og einki lønandi fund er gjørt, so eiga vit at fegnast um, at ein virkin kolvetnisskipan er staðfest. At tað skulu borast fýra burnnar aftrat innan tvey ár og aftrat hesum komandi verandi 9 ára loyvi og so nú eisini 2. útbjóðing eru spennandi avbjóðingar. Samanumtikið er eingin orsøk til panikk. Hetta krevur tíð og tol sum so oftani hevur verið víst á.

Fyri føroyska samfelagið, ið treingir fleiri búskaparlig bein at standa á, eru bjartskygdu vónirnar á Atlantsmótinum sera kærkomnar

## Bedlington helst turrur

**Føroyska Atlants Kolvetni við í boringini við 1 prosenti**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Wilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni: – Vit leita eftir samstarvspartnarum til aðru útbjóðing*

Nú tíðindini hava verið frammi um, at eitt og møguliga tvey stór fund eru gjørd á bretskum øki har norðuri við markið, (Lochnagar og Cambo) vilja onnur tíðindi (sum Sosialurin tó ikki hevur fingið váttað) vera við, at Bedlingtonbrunnurin, sum er boraður heilt har suðuri við markið, er turrur. Føroyska olju-felagið Atlants Kolvetni var partur av tí brunninum við 1%. Bretska oljufelagið BG stóð fyri boringini og hevði meginpartin av váðanum. Eisini danska Dong var við í hesi boringini.

Wilhelm Peteren, stjóri í Atlants Petroleum hevur onga viðmerking til hesi tíðindini, tí brunnurin er ein sokallaður "tigh hole" brunnur. Wilhelm Petersen sigur annars, at Atlants Kolvetni í løtuni hyggur eftir samstarvsmøguleikum at vera við í samtaki, sum fer at bjóða í 2. rundu við Føroyar. Hann hevur sjálvur rímuligar vónir um, at tað fer at eydnast. Annars hevur felagið fingið tillutað tað øki, sum tað søkti um í bretsu rundini. Um fundið, sum er gjørd hinumegin markið, sigur føroyski oljustjórin, at tað ljóðar áhugavert.